# Oljudálking í Gøtu

**Nakrir hundrað litrar av olju eru liknir út í Eiðisá í Norðagøtu. Lekin stavar frá einum ótøttum røri í nýggjum sethúsum, sum liggja miðskeiðis í bygdini**

DÁLKING
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Sløkkiliðið í Norðagøtu hevur lagt oljusperringar út í Eiðisá, sum er áin ið rennur oman ígjøgnum Gøtudal og Norðagøtu. Sambært sløkkiliðsleiðaran í Gøtu Kommunu, Sørin Djurhuus, er tíbetur ikki talan um nakran stóran oljuleka. Lekin stavar frá einum nýggjum sethúsum, sum liggja mitt í bygdini.

Tað var leygarkvøldið, at fólk í bygdini gjørdust varug við oljulukt, men ikki fyrr enn sunnudagin varð funnið fram til, hvaðani roykurin stavaði frá. Talan var um eitt ótætt rør millum oljutangan og oljufýringina í húsunum. Sløkkiliðsleiðarin sigur, at lekin varð tettur beinanvegin og klokkan 17 vórðu oljusperringarn lagdar út í ánna. Higartil eru komnar millum 200 og 300 litrar í sperringina.

Søren Djurhuus kann onki tryggja, men metir ikki, at lekin hevur gjørt tann stóra skaðan.

- Vit síggja onki til, at hetta hevur gingið út yvir lívið í ánni. Tvørturímóti sær út til, at sílini hava tað fínt, og at fiskað verður í sama mun, sum áðrenn lekan, sigur sløkkiliðsleiðarin.

Hann vísir á, at tað skal sera lítið til, at oljan luktar og skapar ælabogar í vatninum. Hinvegin sigur hann, at áin í Norðagøtu er eitt gott spæliplás hjá børnunum, og tí er tað týdningarmikið at reinsa ánna væl.

Ein vanligur oljutangi tekur millum 1000 og 1500 litrar av olju, men Sørin Djurhuus sigur seg vita fyri vist, at talan er um minni enn 1000 litrar, sum kunnu vera liknir út í ánna.

- Tað er ógvuliga sjáldan, at slíkt hendir í nýggjum húsum. Vanliga er talan um gamlar og slitnar tangar og rør, tá lekar eru, sigur Sørin Djurhuus.



*Oljusperringar eru lagdar út í Eiðisá í Norðagøtu, eftir at olja er likin úr einum ótøttum røri frá einum nýggjum sethúsum í bygdini*
*Mynd: Jonhard Hammer*



*Sløkkiliðsleiðarin í Gøtu Kommunu, Sørin Djurhuus, heldur ikki, at oljulekin hevur nervað lívið í ánni og ósanum í Norðagøtu*
*Mynd: Jonhard Hammer*

# Rossen og Rosanes til Føroya

**Leygarkvøldið 20. oktober verða tvær konsertir í Norðurlandahúsinum, har Stig Rossen og Tamra Rosanes koma at hava hvør sína konsert. Talan verður um tvær solokonsertir, men hava bæði Stig Rossen og Tamra Rosanes tónleikarar við sær.**

TÓNLEIKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Stig Rossen*



*Tamra Rosanes*

Stig Rossen telist millum teir stóru heimskendu donsku sangararnir, sum í meiri enn 25 ár hevur framført kring heimin innan nógv ymisk tónleikasløg. Stig Rossen trein á heimspallin í 1990, tá hann varð valdur at spæla høvuðsleiklutin, Jean Valjean, í musikalinum Les Miserables, sum varð framførdur hundraðtals ferðir í 10 ymiskum londum.

Stig Rossen hevur umframt musikal-heimin eisini verið rundanum rock, popp og opera, og er ikki minst kendur fyri sínar framúrskarandi jólakonsertir, sum hvørt ár draga í túsundavís av áhoyrarum runt Danmark. Stig Rossen hevur eisini lagt rødd til fleiri av Disney teknifilmunum og hevur sungið donsku útgávurnar av fleiri kendum Disney filmum. Stig Rossen hevur eisini spælt inn duettir við millum øðrum Nana Mouskouri og Grethe Ingmann.

Stig Rossen hevur givið út eina langa røð av plátum og fløgum, t.d. „Starry Starry Nights", „The Impossible Dream", „Live In Concert", „Letters Of Love", "Julelys", "Stories", "Love Changes Everything", "This Is The Moment" og "Når du ser et stjerneskud".

Áðrenn ferðina til Føroyar skal Stig Rossen saman við øðrum donskum stjørnum framføra á eini gallakonsert í Tivoli, til frama fyri Dansk Folkehjælp. Og eftir vitjanina í Føroyum byrja tær árligu jólakonsertirnar, sum eru kring Danmark í november og desember mánað.

### Um Tamra Rosanes

Tamra Rosanes er í øllum Evropa kend sum tann ókrúnaða danska countrydrotningin. Tamra Rosanes er fødd í USA, har hon eisini vaks upp. Tamra hevur tó búð í Danmark í nógv ár, og hevur hevur havt eina framúrskarandi karrieru, bæði sum sangari og sangskrivari.

Tamra Rosanes byrjaði sína professionellu lívsleið í 1972 og hevur síðan hetta spælt inn eina langa røð av plátum, bæði í USA og í Danmark. Eftir at hava sungið kór á fleiri enn 500 útgávum í Danmark, fekk hon sjálv gjøgnumbrot í 1991 við country-útgávuni "Gentle Fire". Eftir hetta eru komnar fleiri útgávur: "GoodTimes", "Footloose", "Country Roots", "With Strings", "Pleasure & Pain", "Like I Like It", "Country Party", "Cowgirl In Love", "Over the Ocean", og "LineDANCEparty".

Í 2001 stóð Tamra Rosanes aftanfyri super-trio'ina "Cowgirls" við Sanne Salomonsen og Lis Sørensen, sum góvu út "Girls Nigth Out" og "Country Party", har country-klassikarar sum Let Your Love Flow, Nine to Five, Jambalaya og Rose Garden eisini eru at finna.

Tamra Rosanes telist millum teir virknastu donsku sangskrivararnir og er eisini ein av teimum allarbest dámdu donsku konsertartistunum. Hvørt ár er hon at finna á palli á teimum flest donsku summarfestivalunum, og í heyst gongur leiðin so til Føroyar.

Atgongumerkjasølan til konsertirnar báðar byrjar í næstum. Meiri verður lýst um hvar og hvussu ein kann ogna sær eitt atgongumerkið til konsertina við Stig Rossen og konsertina við Tamra Rosanes. Konsertirnar verða í Norðurlandahúsinum leygarkvøldið 20. oktober.